## DAGSINS MEINING

### Sjálvandi ólavsøkudag

Nú hava tingmenn og flokkar tala at, tí løgtingið skal setast ein sunnudag. Ólavsøkudagur er sunnudagur, og tingmenn halda tí, at tað er brot á halgidagslógina, at Tingið verður sett sunnudag. Ein tingmaður, Henrik Old, ætlar ikki at møta upp, og ein flokkur, Miðflokkurin, hevur heitt á løgtingsformannin um at seta tingið mánadagin staðin fyri.

Ólavsøka er tjóðarhátíð okkara, og ein tann mest tignarliga løtan er skrúðgongan, sangurin, og løgtingssetan, sum kanska skuldi verið sett úti, um veðrirð annars var til vildar. Ólavsøkudagur er ikki bara í hugaheiminum hjá flestu føroyingum ein hátíðsdagur, nei, hann er hátíðsdagurin fram um aðrar hátíðsdagar, meiri hátíðarligur enn sunnudagur ella halgidagur.

Tí er tað næstan í sjálvum sær løgið, at nøkrum kemur til hugs, at tingsetan í ár er brot á halgidagslógina. Men er tingsetan brot á halgidagslógina, so er tað eisini brot á stýrisskipanarlógina, um løgtingið ikki verður sett ólavsøkudag. Men í staðin fyri at gera so nógv burtur úr hesi tilvildini í ár, áttu tingmenn heldur at tikið í egnan barm, tí høvdu teir viðgjørt uppskotið til stýriskipanarlóg nóg væl, høvdu teir tá komið fram til, at ólavsøkudagur viðhvørt er sunnudag…

Men tá halgidagslógin er nevnd, so áttu politikkarar okkara tikið eitt stig afturat, og spurt, um halgidagslógin ikki er ein fornleivd, sum ikki er í samljóð við dagin í dag, og sum regluliga verður brotin.

Samanumtikið eigur løgtingið sjálvandi at verða sett ólavsøkudag – tjóðardag okkara – at flyta tingsetanina til dagin eftir, mánadag, er háð ímóti tjóðardegnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Smærugøta og vit onnur

**Yvirlýsing frá felagnum Sinnisbati í samband við menningartarnað í Smærugøtu**

**Vegna Sinnisbata**
*Svenning av Lofti*
*formaður*



Tað harmar okkum, at t að í ár 2001 er neyðugt at minna fólk á, at øll í samfelagnum hava rætt til sámuligan bústað og livikor, og at øll hava rætt til at búgva, har tey ynskja tað – eisini tey menningartarnaðu og onnur brekað.

Royndirnar, ið Sinnisbati hevur frá teimum báðum húsunum, sum felagið hevur fingið til vega her í Havn, Sólteigur 11 og Eysturstræti 4, eru, at gomlu grannarnir hava tikið sera væl ímóti nýggju og veiku grannunum, hava víst teimum umsorgan og kærleika.

Sinnisbati ynskir við hesi yvirlýsing at stuðla felagnum Javna í arbeiði tess fyri at bøta um kor teirra menningartarnaðu og royna at finna teimum hóskandi bústað og bøta um lívsdygd teirra.

# Eftirlønin – Skal broytast afturvirkandi!

**Eivind Jacobsen**
**Olav Enomoto**
**Michael Jensen**
**Finnur Jensen**

Løgtingið samtykti fyrr í ár, at eftirlønir hjá landsstýrismonnum skuldu hækkast munandi. Hendan hækking var alt ov stór, og tí átti hetta at verið broytt sum skjótast.

Okkara ráðandi menn skulu sjálvandi hava løn, men hon skal eisini vera rímilig. Men tað, sum samtykt varð í mai, var als ikki rímiligt. Harumframt sæst í viðmerkingum til lógina, at ætlanin er at broyta eftirløn til tingmenn seinni!?

**Hava lóggivið í egnan lumma**
Lógin um eftirløn landsstýrismanna var eisini gjørd við afturvirkandi kraft (líka til 1951). Var hetta neyðugt? Teir, sum hava sitið í Landsstýrinum, kendu til treytirnar í sínum arbeiði í Tinganesi. Teir kundu havt takkað nei fyri tilboðið tá. Tað er eingin rímilig grundgeving fyri, at persónur, sum hevur verið landsstýrismaður í 1 ár, skal fáa eftirløn, og so leingi sum hann livur. Hetta er ikki rímiligt.

Tað kann hugsast, at hetta ger, at hugurin til eftirløn verður størri, enn at tæna landi og fólki.

Sum dømi kann nevnast, at borgarstjórar fáa 15% omaná lønina, sum verður inngoldin í eftirlønargrunn tað tíðina, teir eru í starvi, umframt at teir fáa løn í 6 mánaðir, eftir at teir eru farnir frá. Hendan skipanin hevði verið nógv meira rímilig fyri okkara landsstýrismenn enn okkara skipan sum heild.

**Óheft nevnd skal setast**
Vit vilja mæla til, at sett verður óheft nevnd, sum framyvir ger tilmæli ella uppskot hvørja ferð, lønir skulu broytast. Hetta verður gjørt í øðrum londum.

Ein slík skipan hevði eisini forðað fyri, at løgtingsmenn og gamlir landsstýrismenn sjálvir sita og áseta sína egnu løn. Núsitandi løgtingsmenn hava eina sera óhepna skipan, sum ikki hóskar seg í einum demokratiskum samfelag, og eigur hon tí at verða broytt sum skjótast!

**Broytið lógina**
Sambandsposturin tók hetta mál upp beinanvegin í mei, og vit vilja nú venda okkum til allar løgtingsmenn og heita vit staðiliga á teir um at taka stig til at broyta hesa órímiligu lóg. Okkara áheitan umfatar allar núsitandi løgtingsmenn. Tit eiga at verða fyrimynd fyri borgaran, og tí mugu tit rætta lógina. Tað líkist ikki tykkum, at slík lóggáva verður samtykt anno 2001 í Føroyum. Vit fara at gera okkara ávírkan galdandi fyri at fáa hesa lóg broytta, so at lønin til okkara ráðandi menn verður á einum støði, sum sømir seg. Tað ber ikki til at krevja aftur løn, sum er útgoldin, men vit meina, at lógin skal broytast við afturvirkandi kraft sum skjótast.!

# Open Day í Hoydølum

Hesi seinastu vikurnar hevur lega verið hildin í Hoydølum. Tað er CISV, sum stendur fyri leguni. CISV eitur á føroyskum altjóða barnalegur, og hevur hesin felagskapur verið virkin í Føroyum í nógv ár. Í ár eiga føroyingar so tørn at skipa fyri einari legu. Legur verða hildnar kring allan knøttin, og limalondini í CISV eru eisini rættiliga mong. Á hvørjari legu koma luttakarar úr øllum heiminum. Fýra børn, sum eru um ellivu ára aldur, luttaka, saman við einum leiðara, frá hvørjum landi. Eisini eru nakrir sokallaðir ungleiðarar við. Hesir eru eini seytjan ár. Á leguni í Hoydølum luttaka so fjarliggjandi lond sum Thailand og Kanada, umframt fleiri norðanlond.

Eitt tiltak, sum er á øllum legum hjá CISV, er “Open Day”. Sum navnið eisini sigur, so er hetta ein dagur, har almenningurin fær atgongd til leguna. Til ein slíkan “Open Day” fara delegatiónirnar úr teimum ymiskum londunum, sum luttaka á leguni at vísa eitthvørt fram. Vanliga er hetta ein ógvuligan spennandi dagur, har hvørt landi sær ger nógv burturúr. “Open Day” verður í Hoydølum í kvøld frá 18 til 21. Fyrireikarnir vóna at síggja fit av fólki í Hoydølum, tá tey nógvu ymisku umboðaðu londini fara at sýna fram, hvat tey hava at bjóða uppá.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Statoil Kring Føroyar aftur í gongd



*Aftur í ár verður skipað fyri Statoil Kring Føroyar súkklukappingini, hesaferð sterkari og meiri spennandi enn undanfarin ár*

**Nú fer Statoil Kring Føroyar, Føroya størsta súkklukapping, aftur av bakkastokki, og hesaferð er kappingin harðari og støði hægri enn nakrantíð áður**

SÚKKLING
*Heini í Skorini*

Fyri fimtu ferð á rað verður skøtil nú settur á súkklukappingina Statoil Kring Føroyar, og fyrsta árið var í 1997. Á tíðindafundi í HB-húsinum fyrrapartin mánadag segði Jens Glerup, formaður í Tórshavnar Súkklufelag, at teir aftur í ár eru sera glaðir at skipa fyri Statoil Kring Føroyar.

Jens Glerup segði, at kappingin hevur verið sera væleydnað seinastu árini, og at tað ikki vera tær stóru broytingarnar í ár, við tað at tað seinastu árini hevur gingið væl. Men hóast tað vera smáar broytingar viðvíkjandi longd á teinum og hvar súkklararnir skulu súkkla á ymsu støðunum kring landið.

Aftur í ár er Statoil høvuðsstuðul, og sambært Steinfinni Mittelstein, umboðsmanni hjá Statoil, eru teir sera glaðir fyri gott samstarv við Tórshavnar Súkklufelag.

### Kappingin sterkari enn nakrantíð

Kappingin í ár er sterkasta Statoil Kring Føroyar kapping, sum yvirhøvur hevur verið, og serliga er áhugin fyri kappingini vaksandi uttanlanda. Fleiri og fleiri útlendingar koma við til kappingina, og í ár eru ikki minni enn seks súkklarar úr Danmark úr A bólkinum við, sum er bólkurin við sterkastu súkklarunum. 37 súkklarar eru tilsamans við í kappingini frá byrjan, harav fleiri útlendingar, og er tað hægsta luttakaratal nakrantíð. Luttakaratalið í fjør var 29.

Byrjað verður í Klaksvík, og hinir teinarnir eru í Eysturoynni, á Sandoynni, í Suðuroy, meðan seinasti teinurin verður í Havn. Á tíðindafundinum varð millum annað nevnt, at eysturoyarteinurin er sera harður, og at hann fer at geva eina mynd av, hvussu sterkir súkklararnir í veruleikanum eru. Eisini er teinurin uppum Hestin í Sumba sera harður og torførur hjá súkklarunum. Á Sandoynni verður súkklað í einkulstarti, og her hevur Tórshavnar Súkklufelag gjørt teinin 3-4 km styttri, eins og teir eisini hava stytt teinin í Havn.

Jens Glerup í Tórshavnar Súkklufelag nevndi føroyingin í Danmark, Rógva Johansen, sum ein av heitu favorittunum til kappingina, og hann fer væntandi at vera tann føroyingurin, sum kemur at stríðast um gullið. Harðastu kappingarneytar hansara vera uttan iva hinir súkklarar úr A bólkinum í Danmark.

Kenneth Gormsen er ein súkklari úr Danmark, og hann hevur verið við í Statoil Kring Føroyar seinastu árini. Kenneth var til staðar á tíðindafundinum, og hann segði, at kappingin er ein hin best fyrireikaða kapping hann hevur luttikið í, samstundis sum støði eftir hondini er vorðið sera høgt. Kenneth Gormsen segði, at tað er ein sera stór avbjóðing at vera við, og at kappingin verður sera hørð.

### Eingi lið í ár

Í Statoil Kring Føroyar kappingini í fjør varð eitt Shell lið meldað til, og hetta tók spenningin úr kappingini, við tað at einstaklingarnir ikki høvdu nakran møguleika at súkkla ímóti súkklarunum á Shell liðnum. Jens Glerup segði á tíðindafundinum, at tað ikki verður loyvt at melda til sum lið í ár, við tað at spenningur hvørvur. Sostatt súkkla allir luttakararnir hvør sær, og ger tað kappingina meiri spennandi og áhugaverda.

Uttanlanda síggja vit, at júst umtalaða fyribrigdi er vaksið sera nógv. Í hesum døgum er heimsins størsta súkklakapping, Tour de France, í gongd, og her súkkla allir í ymiskum liðum. Men tíðin er sambært Tórshavnar Súkklufelag ikki búgvin til tess í Føroyum.

### Útlendingar áhugaðir

Eisini kom fram á tíðindafundinum, at aðrir útlendingar enn danir hava víst áhuga fyri kappingini. Tórshavnar Súkklufelag hevur tosað við bæði hetlendingar og súkklarar av Orknoyggjunum, og teir hava allir víst stóran áhuga í Statoil Kring Føroyar. Í ár kom tó einki ítøkiligt burturúr, men í næsta ár er møguligt, at fleiri av hesum fara at luttaka í Statoil Kring Føroyar.

Sostatt er henda súkklukapping veruliga vorðin ein stór kapping, ikki bara millum føroyingar, og um Statoil Kring Føroyar heldur á at mennast, kunnu vit um nøkur á vónandi skipa fyri eini kapping, sum er høgt í metum bæði í Føroyum og í londum kring okkum.

Ársins útgáva av Statoil Kring Føroyar fer sostatt av bakkastokki 18. juli á Borðoynni meiri spennandi og á hægra støði enn nakrantíð.



*- Kappingin er sera væl fyrireikað, og tað er ein sera stór avbjóðing at vera við, sigur danski súkklarin Kenneth Gormsen um Statoil Kring Føroyar*

# Bogi satsar ikki uppá gullið



*Bogi Christiansen sigur seg ikki satsa uppá gullið, hóast hann hevur fingið góð úrslit seinastu tíðina*

**Bogi Christiansen, sum júst hevur vunnið bronsuheiðursmerki á Oyggjaleikunum á Man, fer ikki eftir gullinum í Statoil Kring Føroyar**

SÚKKLING
*Heini í Skorini*

Bogi Christiansen, ein av okkara bestu súkklarum, verður í ár ein av luttakarum í Statoil Kring Føroyar. Bogi var ikki við í fjør, og var hetta orsaka av familju og arbeiði. Bogi helt í fjør sabbatár frá súkkling, men er nú við aftur.

- Eg satsi ikki uppá at vinna kappingina, og eg veit eisini, at súkklararnir í A bólkinum eru favorittarnir, sigur Bogi Christiansen. Bogi súkklar sjálvur í B bólkinum, og hann sigur seg ikki vera við fyri at vinna, hóast hann hevur fingið góð úrslit seinastu tíðina.

Bogi vann herfyri stóra kapping í Danmark fyri menn yvir 30 ár, samstundis sum hann fekk eitt bronsuheiðursmerki á Oyggjaleikunum á Man.

- Eg satsi uppá at vinna etapur, meðan eg veit, at eg í einkultstarti fari at missa tíð. Tískil vænti eg mær ikki tað heilt stóra í samlaðu støðuni, men fari meiri eftir etapusigrum.

Bogi Christiansen hevur vant síðani oktober í fjør, og hann kennir seg vera væl fyri eftir steðgin frá súkkling í fjør. Spurdur, hvat hann væntar av kappingini í ár, sigur Bogi, at kappingin er sera hørð og spennandi.

- Kappingin í ár er uttan lið mótvegis í fjør, og tí kunnu vit vænta eina sera harða og spennandi kapping. Støði hækkar ár um ár, og í ár eru fleiri sera sterkir súkklarar við, sum uttan iva fara at gera kappingina spennandi, sigur Bogi Christiansen, sum 18. juli fer saman við 36 øðrum súkklarum undir Statoil Kring Føroyar 2001.